umhvørvisstovan

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
VAGLIÐ
POSTBOX 32
110 TÓRSHAVN

Argir hin 30. januar 2013
Málsnr.: 11/00019-40
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

**Spillivatnsætlan góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 30. januar 2013, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og í § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Tórshavnar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 02-01-2011 spillivatnsætlanina hjá Tórshavnar kommunu til góðkenningar (US mál nr. 11/00019-1).

Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan samskift við kommununa, og 07-05-2012 fekk Umhvørvisstovan eina dagførda ætlan (US mál nr. 11/00019-28) til góðkenningar. Ætlanin varð endaliga samtykt av Tórshavnar býráð hin 1. november 2012, og hevur Umhvørvisstovan hin 23. januar 2013 fingið endaligu útgávuna av samtyktu ætlanini (US mál nr. 11/00019-41).

Sambært spillivatnsætlanini verður spillivatnið í Syðradali, Norðradali, Kollfjarðardali og Hundsarabotni ikki leitt út á sjógv. Í staðin hevur kommunan valt aðrar loysnir, so sum niðurseyring og minireinsiskipan, sum er heimilað í § 10, stk. 2 í kunngerðini um spillivatn.

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í dagførdu ætlanini verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn.

Góðkenningin umfatar einans krøv, sum eru ásett í kunngerðini, t.v.s. tann umhvørvisliga partin av spillivatnsætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar, og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, smittuvanda, uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10, stk. 3 í kunngerðini, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá at góðkenningin er alment kunngjørd.

Kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum síðan sendur kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur týðandi persónligan týdning fyri.

Avgerðin verður lýst á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni og við almennari lýsing.

Suni Petersen, deildarleiðari

/

Maria Gunnleivsdóttir Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Landslæknin, Sigmundar gøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn